FG-006/2024

FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

# Frágreiðing

## um løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)

Frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins

## Innihaldsyvirlit

Samsvarandi § 7, stk. 4 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi leggur landsstýrismaðurin, áðrenn 20. februar á hvørjum ári, frágreiðing fyri Løgtingið sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja.


**1.** Løgtingslóg um sjófeingi. Hvat er sett í verk. Tey mest týðandi økini í tíðarskeiðinum fyri 1. februar 2025.
**2.** Hagtøl um fiskiveiðu.
**3.** Uppboðssølurættindi, menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir.
**4.** Veiðirættindi og avtalur um veiðirættindi.
**5.** Vørn. Støðulýsing innan fiskiveiðieftirlit.
**6.** Havstovan. Støðulýsing av mest týðandi fiskastovnunum.
**7.** Landsstýrismaðurin. Hvørjar ætlanir hevur hann í hyggju at fremja.


## 1. Løgtingslóg um sjófeingi

### Fiskidagatal á landgrunninum og umsitingarætlan

Sambært sjófeingislógini skal landsstýrismaðurin áseta fiskidagatalið eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu, sum hevur meginreglur fyri burðardygga stovnsrøkt.

Í 2021, 2022 og 2023 var dagatalið sett eftir eini umsitingarætlan, sum ein arbeiðsbólkur legði lunnar undir í mai 2019, og sum landsstýrið seinni tók undir við. Umsitingarætlanin skal stuðla undir burðardyggan fiskiskap eftir toski, hýsu og upsa, og at vinnan í rímiliga tíð frameftir veit, hvørjir fiskimøguleikarnir vera.

Henda umsitingarætlan og veiðiregla skuldi eftirmetast triðja hvørt ár og í seinasta lagi, áðrenn fiskidagar vórðu ásettir fyri 2024. Sambært tilmælinum frá Havstovuni fyri 2024 hevði støðan í toskastovninum ongantíð áður verið so vánalig, og gýtingarstovnurin var komin niður um ásetta vandamarkið, $B_{lim}$. Staðfest var, at neyðugt var við átøkum fyri at verja og endurreisa stovnin. Niðurstøðan í eftirmetingini var tí, at neyðugt var at broyta veiðiregluna, so hon betur legði upp fyri støðum, har stovnar á landgrunninum eru illa fyri.

Broytingin ber í sær, at veiðireglan í umsitingarætlanini nú er í tveimum: Ein langtíðarveiðiregla og ein endurbyggingarætlan. Veiðireglan er broytt soleiðis, at eitt nýtt niðara vandamark er sett inn afturat fyri gýtingarstovnarnar. Um ein ella fleiri av gýtingarstovnunum eru mettir at vera niðan fyri hetta vandamarkið, skulu serlig verjutiltøk setast í verk, og dagatalið skerjast við meiri enn teimum fimm prosentunum, sum eru í langtíðarveiðiregluni.

Samsvarandi nýggju veiðiregluni var fiskidagatalið í 2024 hjá bólki 3-5 skert við 20 prosentum og fiskidagatalið hjá bólki 2 við 10 prosentum.

Endurbyggingarætlanin í 2024 var eitt bráðfeingis tiltak, sum skuldi eftirmetast, áðrenn fiskidagar verða ásettir fyri fiskiárið 2025. Hetta varð gjørt, og gjørt var av at broyta veiðiregluna soleiðis, at um ein ella fleiri av gýtingarstovnunum eru mettir at vera niðan fyri vandamarkið, skal fiskidagatalið hjá øllum bólkum skerjast við 10 prosentum.

Toskurin á landgrunninum sær nú út til at vera betur fyri. Hetta sæst aftur, bæði í at meira er at fáa av toski og í seinasta tilmælinum frá Havstovuni og ICES. Stovnurin er tó framvegis mettur at vera niðan fyri vandamarkið, og tí legði nýggja veiðireglan eisini upp til lívfrøðiligt varsemi í 2025.

Veiðireglan í nýggju umsitingarætlanini skal eftirmetast í minsta lagi triðja hvør ár. Um veiðireglan ikki verður mett at stuðla undir at røkka endamálinum, ella at fyritreytirnar, ið reglan byggir á, eru grundleggjandi broyttar, kann landsstýrismaðurin taka stig til at endurskoða regluna.

Umframt tilmælið um at skerja fiskidagatalið í 2025, mælir Havstovan til at seta onnur tiltøk í verk, fyri at verja toskastovnin á føroyska landgrunninum og á Føroyabanka. Eitt týðandi tiltak er at leingja galdandi gýtingarfriðingar, soleiðis at tær byrja fyrr og enda seinni. Í januar 2024 var kunngerð lýst, sum leingir tíðarskeiðini fyri veiðibann á gýtingarleiðum hjá toski fyri at verja toskastovnin.

## Broyting í kunngerð um vernd av ungfiski

Á vári 2024 var kunngerðin um vernd av ungfiski broytt, tí mett var, at tær mannagongdir, sum vóru galdandi, ikki í nóg stóran mun vardu ungfisk. Tí varð skotið upp, at um ov nógvur ungfiskur av toski, hýsu ella upsa var í veiðuni, skuldi fiskifarið flyta í minsta lagi 5 fjórðingar frá eini og hvørjari knattstøðu á tóvinum næstu 72 tímarnar. Mett var, at ein slík skipan fór at verja ungfisk av nevndu fiskasløgum betur enn verandi skipan. Seinni hevur tað víst seg, at skipanin ikki verjir nevndu fiskasløg nóg væl, og er hetta serliga galdandi fyri upsa. Tí verður umhugsað, um onnur tiltøk skulu setast í verk.

## Botnfiskur á Føroyabanka í 2024

Føroyabanki varð friðaður fyri øllum vinnuligum fiskiskapi í 2008, tó so, at loyvt hevur verið útróðrarbátum at royna eftir botnfiski í avmarkað dagatal við snellu, snøri ella tráðu. Í 2022 var varisliga latið upp fyri vinnuligum fiskiskapi við eini tíðaravmarkaðari serskipan. Tvær høvuðsbroytingar vóru gjørdar: Onnur var, at loyvt varð at royna við línu. Hin var, at línuskip í bólki 3 eisini sluppu á Bankan.

Í 2023 varð sett í verk ein nýggj skipan fyri útróðrarbátarnar undir 15 tons í bólki 5. Atgongdin var avmarkað, so einans teir vinnuliga virknastu bátarnir sleppa á Bankan. Fyri at fáa loyvi, skal báturin hava avreitt fyri 500.000 kr. ella meira minst eitt av seinastu trimum árunum. Skipanin var eisini broytt soleiðis, at bátarnir royndu undir eini skipan við felags fiskidøgum, men at eitt hámark varð sett fyri hvønn bátin.

Í 2023 og 2024 varð skipanin tillagað, so útróðrarbátarnir fingu lutfalsliga fleiri dagar og línuskip lutfalsliga færri dagar. Ein onnur broyting var, at línuskip bara kundu royna á Føroyabanka eftir hálvan august.

Í 2024 varð fiskidagatalið lækkað úr 330 niður í 265.

Uppgerðin hjá Vørn vísir, at í 2024 vórðu fiskað tilsamans 856 tons av botnfiski á Føroyabanka. Tað mesta var toskur, hýsa og longa; ávikavist 56,5 prosent, 22,5 prosent og 11,2 prosent av samlaðu veiðuni. Samlaða avreiðingarvirðið á teimum 1.718 tonsunum av botnfiski var 28,3 mió. kr.

## Landing í Føroyum

Sambært § 41 í sjófeingislógini skal øll veiða hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi landast um bryggjukant í Føroyum; tó kunnu í mesta lagi 15 prosent av veiðuni verða landað uttanlands. Landsstýrismaðurin kann geva undantak frá landingarkravinum fyri ávís fiskasløg í avmarkað tíðarskeið.

Heimildin at geva undantak hevur verið brúkt við tilvísing til vantandi móttøkukapasitet í Føroyum. Serliga fyri svartkjaft í háárstíðini hevur undanfarin ár verið veitt undantak, so skipini hava kunnað landað svartkjaft uttanlands frá apríl fram til hálvan juni. Hetta var eisini galdandi í 2024.

Í 2024 avtalaðu Føroyar og Noreg, at føroysk skip kunnu fiska ein part av føroysku makrelkvotuni í norskum sjógvi. Hendan avtalan við Noreg var treytað av, at allur makrelur, sum føroysk skip fiskaðu í norskum sjógvi, skal seljast gjøgnum ella við góðkenning frá Norges Sildesalgslag. Hendan treytin ger, at makrelur, sum føroysk skip fiska í norskum sjógvi, kann verða avreiddur aðrastaðni enn í Føroyum, og var tí undantikin kravinum um landing um føroyskan bryggjukant. Fyri makrel í norskum sjógvi er treytin tann sama í avtaluni fyri 2025.

Harumframt hava Føroyar gjørt avtalu við Noreg um norðhavssild við Noreg. Eftir hesi avtalu kunnu føroysk skip fiska allar sínar kvotur norðan fyri 62 stig í norskum sjógvi. Treyt er, at veiðan verður seld gjøgnum ella við góðkenning frá Norges Sildesalgslag. Hendan treytin fyri avtaluni ger, at í 2025 verður norðhavssild, veidd í norskum sjógvi, eisini undantikin kravinum um landing og avreiðing í Føroyum.

## Felagskvota av svartkjafti í 2024

Í svartkjaftakunngerðini fyri 2024 var avgerð tikin um at skipa ein part av kvotuni sum felagskvota við hámarki. Talan var um, at 35.000 tons av tøku nøgdunum av svartkjafti í 2024 vórðu sett av til eina felagskvotu. Hámarkið fyri hvørt skipið varð sett til 2.500 tons. Øll, sum høvdu rætt at fiska svartkjaft í 2024, kundu fiska av felagskvotuni treytað av, at tey høvdu brúkt aðrar tillutaðar kvotur av svartkjafti í 2024. Øll felagskvotan upp á 35.000 tons av svartkjafti varð fiskað.

## Brúksskylda

Við teimum broytingum, sum Løgtingið einmælt samtykti í desember 2023, fingu ásetingarnar um generella brúksskyldu á tey loyvi, landið letur til at reka vinnuligan fiskiskap, og ásetingin um brúkstreyt í sambandi við at avhenda fiskidagar ella kvotur, týdning 1. januar 2025.

Generella brúksskyldan ber í sær, at hevur fiskifar við veiðiloyvi ikki verið til vinnuligan fiskiskap í tvey ár á rað, falla øll loyvi og øll veiðirættindi hjá skipinum aftur til landið. Sama fiskifar kann hava fleiri fiskiloyvi til ymiskan fiskiskap. Er ávíst fiskiloyvi ikki brúkt í tvey ár á rað, fellur rætturin til hetta fiskiloyvið aftur til landið. Tvey ára skeiðið fyri uppgerð av nýtslu byrjaði 1. januar 2023. Tí verður kannað eftir, um brúksskyldan er hildin. Vísir tað seg t.d., at fiskifarið als ikki hevur avreitt í 2023 og 2024, falla øll veiðirættindini hjá fiskifarinum aftur til landið. Er tað bert ávíst fiskiloyvi, sum ikki hevur verið brúkt, verður tað rætturin til hetta fiskiloyvið, sum fellur aftur til landið.

Viðvíkjandi brúkstreytini, sum er fyri at avhenda egnar fiskidagar ella egna árskvotu, skulu í minsta lagi 60 prosent av døgunum ella kvotuni vera brúkt fiskiárið frammanundan. Hetta merkir, at fyri at

kunna avhenda t.d. fiskidagar í 2025, skulu í minsta lagi 60 prosent vera brúkt í 2024. Heimild er at geva undantak frá brúkstreytini fyri eitt fiskiár í senn. Her kann til dømis vera talan um støður, har heildarkvotur í nøgd eru somikið lítlar, at grundarlag ikki er fyri rakstri hjá øllum fiskiførunum í bólkinum.

Brúksskyldan og brúkstreytin fyri at avhenda rættindi er ikki galdandi fyri makrel og fiskiloyvi og veiðirættindi hjá útróðrarbátum undir 15 tons.

### Yvirlit yvir ognarviðurskiftini í fiskiskipaflotanum og fiskirættindi í fiskivinnuni

Aftur í ár hava Vørn og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið gjørt yvirlit yvir ognarviðurskiftini í fiskiskipaflotanum og fiskirættindi í 2024.

Yvirlitið yvir ognarviðurskiftini í fiskiskipaflotanum vísir, hvørji samtøk, feløg ella einstaklingar eiga fiskiførini í føroyska fiskiflotanum pr. oktober 2024. Harumframt fevnir yvirlitið um, hvussu avreiðingarvirðið í 2023 var býtt millum samtøk, feløg ella einstaklingar.

Yvirlitið yvir fiskirættindi er bygt upp í trimum stigum:

1. Bólkar. Hvussu eru fiskirættindini í kunngerð skipað í bólkar, tað merkir kvotu- og fiskidagabólkar ella annað slag av bólkum í 2024.
2. Feløg. Hvørji feløg høvdu rætt til fiskirættindi í einstøku bólkunum.
3. Skip og bátar. At hvørjum skipum ella bátum hava feløgini knýtt rættindini.

Á heimasíðuni hjá Vørn, www.vorn.fo, undir snarleiðir, síggjast “Ognaryvirlit” og “Fiskirættindi”.

## 2. Hagtøl um fiskiveiði

Hagtøl um fiskiveiði eru í fylgiskjali 1.

Vørn hevur gjørt upp veiðuna hjá føroyskum skipum í føroyskum sjógvi í 2023 og 2024. Veiðan var tilsamans 580.111 tons í 2023 og 412.618 tons í 2024.  (Talva 1.1)

Veiðan hjá føroyskum skipum uttan fyri føroyskan sjógv í 2023 og 2024 er eisini gjørd upp. Veiðan var tilsamans 208.660 tons í 2023 og 255.491 tons í 2024. (Talva 1.2)

Føroysk veiða á øllum leiðum var tilsamans 780.012 tons í 2023 og 667.008 tons í 2024.

Avreiðingarvirðið av føroyskari veiðu á øllum leiðum var tilsamans 4,04 mia. kr. í 2023 og 3,82 mia. kr. í 2024. (Talva 1.3)

Veiðan hjá útlendskum skipum í føroyskum sjógvi, sum eru úr teimum londum, ið Føroyar hava fiskiveiðiavtalu við, er gjørd upp fyri 2023 og 2024. Veiðan hjá útlendskum skipum var 408.464 tons í 2023 og 466.165 tons í 2024. (Talva 1.4)

## 3. Uppboðssølurættindi, menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir

Eftir sjófeingislógini eru summi veiðirættindi latin eftir serligum lógarásetingum og skipanum. Í 2018 og 2019 vóru rættindi seld á uppboði. Serligar kvotur av uppsjóvarfiski eru latnar til vinnuligar menningarætlanir kring landið. Harumframt eru nøgdir av uppsjóvarfiski settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir, flokkaðar í tríggjar bólkar: 1) Verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av fiskasløgunum, 2) Kvotur til ítøkiligt skipakeyp og 3) Ískoytiskvotur.

Samsvarandi ásetingunum í lógini eru flestu av hesum kvotum nú lagdar um til vanligar egnar árskvotur, ella verða tað, sum frá líður.

## Uppboðssølurættindi

Í 2018 og 2019 var partur av føroysku heildarkvotunum av makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum seldur á uppboði sum 3 og 8 ára rættindi.

Í sjófeingislógini er ásett, at tá gildistíðin er runnin, verða hesi rættindini útlutað sum egnar árskvotur. Hetta ber í sær, at tað, sum í 2018 og 2019 er keypt sum 3 ára kvoturættindi, er lagt um til egnar árskvotur til egið fiskifar við veiðiloyvi. Í 2027 eru øll rættindi, keypt á uppboði sum átta ára rættindi, eisini løgd um til vanligar kvotur.

## Menningarkvotur

Sambært  løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) var ein partur av tøku føroysku kvotunum av makreli, svartkjafti og norðhavssild settur av til at brúka í vinnuligum menningarætlanum kring landið. Latast kundu í mesta lagi 8,5 prosent av samlaðu føroysku kvotuni av svartkjafti, makreli og norðhavssild.

Allar hesar menningarkvotur skuldu í seinasta lagi 31. desember 2021 knýtast at egnum fiskifari. Tað, ið ikki var lagt um til egnar árskvotur, fall aftur til landið og er lagt afturat nøgdini, sum er sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir.

## Kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir

§ 49 í sjófeingislógini fevnir um vinnuligar royndir og verkætlanir. Greinin ásetir, at tær nøgdir av svartkjafti, norðhavssild og makreli, sum eru ásettar í greinunum 14 og 15 skuldu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Vinnuligar royndir og verkætlanir vóru býttar í tríggjar bólkar:

1) § 49, stk. 1, 1. pkt.: Verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av fiskasløgunum.
2) § 49, stk. 1, 2. pkt.: Kvotur til ítøkiligt skipakeyp.
3) § 49, stk. 2: Ískoytiskvotur.

60 prosent av samlaðu nøgdini vóru sett av til § 49, stk. 1, tað vil siga til *nýskapandi verkætlanir á landi og til ítøkiligt skipakeyp*.

40 prosent av samlaðu nøgdini vóru sett av til § 49, stk. 2, tað vil siga til *ískoytiskvotur*.

Ískoytiskvoturnar vóru latnar fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskiførum, ið ikki høvdu eitt nóg stórt kvotugrundarlag til at skipa raksturin. Tað var ein treyt fyri at fáa ískoytiskvotu, at felagið ikki skuldi hava ræði á meira enn 8 prosentum av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær. Teir stóru aktørarnir í vinnuni kundu sostatt ikki fáa ískoytiskvotu.

Játtan varð latin trimum feløgum um kvotur til verkætlanir á virkjum á landi, tvey skip fingu játtað kvotur til ítøkiligt skipakeyp, og 7 skip fingu játtað ískoytiskvotur.

Allar verkætlanirnar fingu tilsøgn um kvotu í eitt 5 ára tíðarskeið. Tó verður fiskiloyvi bert latið upp til eitt ár í senn og kann bert verða endurnýggjað, um treytirnar í tilsøgnini eru hildnar.

Sjófeingislógin gevur landsstýrismanninum heimild til at umleggja kvoturnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, harundir til ítøkilig skipakeyp og ískoytiskvotur til egnar kvotur, um mett verður, at grundarlag er fyri framhaldandi og burðardyggum fiskiskapi, og treytirnar annars hava verið hildnar.

Kvoturnar hjá báðum skipunum, sum fingu kvotur til ítøkiligt skipakeyp, eru nú umlagdar til egnar kvotur. Somuleiðis eru ískoytiskvoturnar hjá øllum 7 skipunum, sum fingu játtað ískoytiskvotur, umlagdar til egnar kvotur.

## 4. Veiðirættindi og avtalur um veiðirættindi

Føroyar hava, umframt livandi tilfeingið í føroyskum sjógvi, rættindi at veiða uttan fyri føroyskan sjógv. Yvirlit yvir fiskiveiðiavtalur fyri 2024 og 2025 er í fylgiskjali 2.

### Sínámillum fiskiveiðiavtalur

Sínámillum fiskiveiðiavtalur eru fyri 2024 og 2025 gjørdar við Ísland, Grønland, Noreg og Russland. Avtalurnar fevna um, at Føroyar fáa rættindi at veiða kvotur í havøkjunum hjá hesum londum í býti við kvotur í føroyskum sjógvi.

Tá Bretland fór úr ES, broyttust umstøðurnar fyri fiskiveiðisamstarvinum við ES. Eingin sínámillum fiskiveiðiavtala hevur verið við ES síðan 2020. Samskifti er tó áhaldandi millum partarnar um møguleikar fyri framtíðar samstarvi á fiskiveiðiøkinum.

Føroyar gjørdu fiskiveiðiavtalu við Bretland fyri 2024. Føroyar kundu fiska 850 tons av svartkalva, 400 tons av hýsu og 375 tons av blálongu, longu og brosmu. Í býti fekk Bretland 1.520 tons av toski, hýsu og upsa (toskur í mesta lagi 276 tons og einans sum hjáveiða), 180 tons av blálongu og longu, 40 tons av flatfiski, 10 tons av kongafiski og 475 tons av øðrum botnfiski. Samráðingar eru við Bretland um fiskiveiðiavtalu fyri 2025, men hesar eru ikki lidnar.

Fiskiveiðisamráðingarnar millum Føroyar og Ísland hava verið á politiskum stigi, men Føroyar og Ísland skrivaðu í 2022 undir ein rammusáttmála, sum skipar fiskiveiðisamstarvið millum londini av nýggjum. Við nýggja sáttmálanum, sum kom í gildi í 2023, eru samráðingarnar landanna millum nú á embætismannastigi.

Føroyar hava í 2025 fingið rætt at fiska 5.600 tons av botnfiski í íslendskum sjógvi, harav upp til 2.400 tons av toski. Fiskiskapurin eftir brosmu er avmarkaður til 400 tons. Føroyar hava sambært avtaluni eisini rætt til at fiska í mesta lagi 30.000 tons av lodnu í íslendskum sjógvi. Føroyska kvotan av lodnu er treytað av heildarkvotuni, sum Ísland ásetir vegna tey trý strandarlondini – Ísland, Grønland og Noreg. Fyribils er eingin lodnukvota sett fyri 2025. Sambært avtaluni fær Ísland 1.300 tons av makreli í føroyskum sjógvi, umframt atgongd at fiska íslendsku kvotuna av svartkjafti og norðhavssild í føroyskum sjógvi. Atgongdin gongur báðar vegir, og kunnu føroysk skip sostatt eisini veiða føroysku kvoturnar av svartkjafti og norðhavssild í íslendskum sjógvi. Avtalan fyri 2025 er í innihaldi óbroytt í mun til avtaluna fyri 2024.

Føroysku kvoturnar í grønlendskum sjógvi eru tær somu sum í 2024. Føroysk fiskifør kunnu í 2025 veiða 2.500 tons av toski, 375 tons av brosmu og 325 tons av svartkalva í Eysturgrønlandi og 100 tons av svartkalva í Vesturgrønlandi. Eisini kunnu fiskifør royndarfiska eftir upp til 500 tons av krabba í Eysturgrønlandi. Í býti hevur Grønland í 2025 fingið sum kvotu 4.900 tons av norðhavssild og 23.750 tons av svartkjafti í føroyskum sjógvi, umframt atgongd at veiða í mesta lagi 7.814 tons av svartkjafti, sum er grønlendska kvotan av svartkjafti sambært samtyktini um fiskiskap eftir svartkjafti í altjóða sjógvi í NEAFC-skipanarøkinum í 2025.

Í norskum sjógvi í Norskahavinum og í Barentshavinum hava Føroyar í 2025 rætt at veiða 5.790 tons av toski, hýsu, upsa og øðrum botnfiski. Hesar kvotur vóru 6.225 tons fyri 2024. Í býti hevur Noreg í 2025 fingið 4.500 tons av botnfiski, sum skal fiskast við línu, og 5.150 tons av makreli í føroyskum sjógvi. Umframt kvotabýtið fáa føroysk skip í 2025 atgongd at fiska 7.445 tons av toski, 1.000 tons av hýsu og 600 tons av øðrum botnfiski, sum eru fingin til vega í sínámillum avtaluni millum Føroyar og Russland, í norskum sjógvi. Føroyar kunnu sostatt flyta alla ta føroysku toska- og hýsukvotuna í Russlandi í norskan sjógv at fiska í 2025. Eisini er avtala gjørd við Noreg um, at norsk skip hava atgongd at veiða part av norsku svartkjaftakvotuni í føroyskum sjógvi.

Fiskiveiðisamstarvið við Russland fekk drúgva viðgerð í 2023 og 2024, og eisini ráðførdi landsstýrið seg við Løgtingsins Uttanlandsnevnd um málið. Fiskiveiðisamráðingarnar við Russland vóru seinast í november í 2024, og var fundurin hildin á talgildum palli. Føroysku kvoturnar í russiskum sjógvi í Barentshavinum eru í 2025 8.445 tons av toski og hýsu, 900 tons av flatfiski og 4.000 tons av rækjum. Kvoturnar vóru í 2024 10.813 tons av toski og hýsu, 900 tons av flatfiski og 4.000 tons av rækjum. Í býti hevur Russland í 2025 fingið 75.000 tons av svartkjafti, 8.080 tons av makreli, 5.800 tons av sild og 500 tons av djúpvatnsfiski í føroyskum sjógvi, og atgongd til føroyskan sjógv at fiska part av russisku svartkjaftakvotuni í altjóða sjógvi í NEAFC-skipanarøkinum. Ein liður í fiskiveiðiavtaluni við Russland fyri 2024 og 2025 er, at áseting varð sett inn um, at russisk skip ikki hava atgongd til serøkið millum Føroyar og Bretland.

## Økisbundnir fiskiveiðifelagsskapir um fiskiskap í altjóða sjógvi

Føroyar hava eisini veiðirættindi, sum eru skipað sambært semjum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum um fiskiskap í altjóða sjógvi.

NAFO (Nevndin fyri fiskivinnusamstarv í útnyrðingspartinum av Norðuratlantshavinum) skipar fiskiskapin uttan fyri kanadiska fiskimarkið. Fyri Føroyar hevur toskurin á Flemish Cap serligan áhuga, umframt fiskiskapur eftir svartkalva og kongafiski. Føroyska toskakvotan er 2.819 tons fyri 2025 í mun til 2.617 tons fyri 2024. Fiskiskapurin eftir toski á Grand Bank er latin upp aftur í 2025, har veiðibann hevur verið síðani 1993. Føroyar fáa eina kvotu upp á 19 tons á Grand Bank (3L) í 2025. Í 2025 er fiskiskapur eftir rækjum ikki loyvdur í NAFO-skipanarøkinum.

NEAFC (Nevndin fyri fiskivinnusamstarv í landnyrðingspartinum av Norðuratlantshavinum) skipar fiskiskapin í altjóða sjógvi í NEAFC-skipanarøkinum. Føroysk fiskifør kunnu royna í mesta lagi í 341 fiskidagar um árið eftir djúphavsfiski í NEAFC-øki. Føroyar hava nú tikið undir við, at veiðibann verður ásett fyri búrfisk í NEAFC-øki. Eingin búrfiskaveiða hevur verið seinastu nógvu árini. Veiða eftir kongafiski í Irmingerhavinum hevur ikki verið loyvd síðan 2021. Føroysk fiskiskip kunnu í 2025 veiða burturav 3.964 tonsum av kongafiski í Norðurhavi, sum er felagskvota fyri NEAFC-sáttmálapartarnar.

SPRFMO (Nevndin fyri fiskivinnusamstarv í Suðurkyrrahavinum) skipar fiskiskapin í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavinum. Føroyska kvotan av rossamakreli í økinum var 11.027 tons í 2023. Føroysk skip hava ikki fiskað á hesum leiðum síðan 2010. Tí var føroyska kvotan í Suðurkyrrahavinum í fleiri ár ikki fiskað. Í 2018 var avtala gjørd við ES um at gera eitt býti, so kvotan varð flutt ES, sum afturfyri flutti Føroyum toskakvotu á Flemish Cap. Seinastu árini er avtala gjørd millum Føroyar og Kili um, at Føroyar lata Kili føroysku kvotuna. Mett verður á hvørjum ári, hvør rætta loysnin er, m.a. við støði í kvotunøgdini, sum í fleiri ár hevur verið rættiliga lág, og útlitunum fyri fiskiskapi í altjóða sjógvi. Seinastu árini hevur stovnurin verið í menning, og er mest loyvda veiðan økt so líðandi.

Á SPRFMO-ársfundinum í 2024 var ein 10 ára semja gjørd um býtið av rossamakrelinum. Sambært semjuni er føroyski parturin av kvotuni 1,0211 prosent, sum er óbroytt í mun til í 2023. Føroyska kvotan í 2024 var 12.682 tons.

Fiskiskapur í fiskiverndarøkinum við Svalbard fer fram sambært Svalbardsáttmálanum. Føroyar hava fiskiskap eftir toski og øðrum botnfiski og rækjufiskiskap við Svalbard. Støðið á føroysku toskakvotuni við Svalbard er ásett eftir søguligari veiði hjá føroyskum fiskiførum í einum umboðandi tíðarskeiði, áðrenn fiskiverndarøkið við Svalbard var stovnsett í 1977.

Heildarkvotan hjá Føroyum í 2025 er 675 tons av toski í mun til 910 tons í 2024. Hýsa, svartkalvi og kongafiskur kunnu einans veiðast sum hjáveiða. Føroysk fiskiskip kunnu veiða rækjur við Svalbard í upp til 922 fiskidagar um árið.

## Ferðandi fiskastovnar – makrelur, svartkjaftur og norðhavssild

Fyri teir ferðandi fiskastovnarnar av makreli, svartkjafti og norðhavssild samráðast strandarlondini um skipan av fiskiskapinum. Føroyskur fiskiskapur eftir uppsjóvarfiski fer fram bæði í føroyskum sjógvi og uttan fyri føroyskan sjógv.

Eftir at Bretland fór úr ES í 2020, eru samráðingar millum strandarlondini um uppsjóvarfiskiskapin víðkaðar við einum parti afturat. Londini hava gjørt semju um mest loyvdu veiðu av makreli, norðhavssild og svartkjafti fyri 2025, sum er ásett samsvarandi ráðgevingini frá ICES (Altjóða ráðið fyri havrannsóknir), men ikki um býtið av heildarkvotuni. Tí hava Føroyar, eins og hini strandarlondini, ásett egnar kvotur av uppsjóvarfiski. Vegna ósemju um býtið av stovnunum hevur fiskiskapurin eftir makreli, svartkjafti og norðhavssild seinastu árini ligið um 30-45 prosent oman fyri vísindaligu ráðgevingina. Føroysku kvoturnar av svartkjafti og norðhavssild vóru í 2024 settar til: svartkjaftur 543.483 tons og norðhavssild 74.219 tons.

Í juni 2024 var makrelsemja gjørd millum Føroyar, Noreg og Bretland. Makrelsemjan hevur stóran týdning fyri burðardyggari umsiting av makrelstovninum. Sambært semjuni verður føroyski luturin

12 prosent av mest loyvdu veiðu. Harumframt fáa Føroyar rætt at veiða 35 prosent av sínum luti í bretskum sjógvi og 40 prosent av sínum luti í norskum sjógvi. Við hesum kunnu skipini nú fiska ein munandi part av makrelinum, tá hann er bestur, til matna. Í 2024 var føroyska makrelkvotan 98.708 tons, og í 2025 verður makrelkvotan 77.024 tons.

Í desember 2024 gjørdu Føroyar og Noreg strandarlandasemju um at býta norðhavssild. Við hesum tóku Føroyar og Noreg í felag ábyrgd til tess at minka um trýstið á norðhavssildastovnin og virka í felag fyri at tryggja, at norðhavssildastovnurin verður umsitin á burðardyggan hátt í framtíðini. Sambært semjuni fáa Føroyar ein býtislut á 10 prosent av mest loyvdu veiðu (MLV), og føroyski parturin verður í 2025 40.179 tons av norðhavssild. Føroyar og Noreg hava somuleiðis gjørt semju um atgongd, sum loyvir føroyskum skipum at fiska alla ta føroysku norðhavssildakvotuna í norskum sjógvi.

## 5. Støðulýsing viðvíkjandi fiskiveiðieftirliti

### Fiskiveiðieftirlit – ein støðulýsing grundað á frágreiðing frá Vørn/Fiskiveiðieftirlitinum

Fiskiveiðieftirlitið hevur sambært § 53 í løgtingslóg um sjófeingi eftirlit við, at reglurnar í lógini, og kunngerðir við heimild í lógini, verða hildnar. Samstundis hevur landsstýrismaðurin flutt fleiri uppgávur til Vørn at umsita og avgreiða.

Í 2024 umskipaðu útlendsk skip 86.837 tons til frystifarmaskip í føroyskum havnum. Harafturat løgdu útlendsk fiskiskip 674 tons á goymslu. Í 2023 vóru 107.571 tons umskipað til frystifarmaskip í føroyskum havnum, og 11.218 tons løgd á goymslu.

Í 2024 umskipaðu útlendsk fiskifør 43 ferðir og uppskipaðu 2 ferðir. Sammett við 2023 minkaði virksemið nakað. Tá umskipaðu útlendsk fiskifør 50 ferðir og uppskipaðu 10 ferðir.

Afturat hesum var nógvur fiskur landaður til virki í Føroyum í 2024. Tilsamans vóru 483.425 tons landað í Føroyum. Størstu nøgdirnar eru uppsjóvarfiskur.

Føroysk skip hava eisini landað nakað av fiski í útlondum. Her er talan um uppsjóvarfisk, serliga svartkjaft.

Undantak hevur verið givið frá kravinum um landingar í Føroyum. Trupulleikar hava verið at sleppa framat at landa svartkjaft til framleiðsluvirki ávísan part av árinum, og tí hevur verið loyvt at landa uttanlands.

Í 2024 vóru 165.911 tons landað til útlendsk virki. Í 2023 vóru 177.089 tons landað til útlendsk virki. Her kann nevnast, at í 2024 var undantak veitt frá at landa svartkjaft í Føroyum frá 11. januar til 1. mars og frá 12. apríl til 15. juni. Eftir áseting í sínámillum semjuni við Noreg um atgongd at fiska makrel var undantak eisini givið fyri makrel veiddur í norskum sjógvi frá 19. juli til 31. desember.
Í 2024 vóru 19.998 tons av makreli fiskað í norskum sjógvi, av hesum vóru 1.761 tons landað í Noregi.

At bretar nú eru uttan fyri ES, og at Bretland tískil er komið afturat teimum pørtum, ið Vørn samstarvar við, hevur við sær broytingar. Tær loysnir, ið Vørn áður hevði saman við ES, kunnu ikki altíð brúkast í samstarvinum við bretar. Samskifti um loyvislistar og upplýsingar um skip og eigarar er øðrvísi enn tað, ið brúkt var í samskiftinum við ES.

Umboð fyri Vørn og bretskir myndugleikar hava samskift um tekniskar loysnir og eftirlitsspurningar í 2024. Bretar eru áhugaðir at samstarva um eina skipan við elektroniskum veiðifráboðanum, ið er lík teirri skipan, ið øll limalondini í NEAFC eru samd um at seta í verk hin 1. januar 2026. Føroyskir myndugleikar hava boðað bretum frá, at vit longu hava samstarv við Noreg, Ísland og Russland á hesum øki, og at ynskiligt er, at eitt samstarv við bretar skal vera líkt hesum. Fyrireikingar til nevndu skipan eru byrjaðar. Enn ber ikki til at siga, hvussu nógva tíð hetta tekur, og hvat kostnaðurin verður.

Bretar hava eisini boðað frá, at ein av treytunum fyri fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski í bretskum sjógvi í 2026 er, at skipini skulu hava vakmyndatól umborð, soleiðis at bretar hava møguleika at síggja, hvat er farið fram. Henda áseting kemur í gildi 1. mars 2026. Bretar hava boðið sær til at fyriskipa kunningartiltak fyri tey, ið fara at verða ávirkað av hesum.

Í samband við útflutning av fiski og fiskavørum til onnur lond eru treytirnar soleiðis, at føroyski útflytarin skal útvega sær eina veiðiváttan (Catch Certificate) frá føroysku myndugleikunum, har váttað verður, at fiskiskapurin er farin fram samsvarandi galdandi reglum. Tá Bretland tók seg úr ES, var neyðugt at gera eina fyribils avtalu við bretar. Báðir partar eru samdir um at fáa eina varandi skipan, ið lýkur treytirnar fleiri ár fram.

Kunnast skal um, at ES hevur boðað frá, at øll viðurskifti viðvíkjandi innflutningi av fiski og fiskavørum til ES fara at verða dagførd og broytt. ES hevur boðað føroyskum myndugleikum frá, at komandi ár skulu øll, ið ætla sær at flyta fisk ella fiskaúrdráttir til eitt ES-land lúka aðrar og víðfevndari treytir enn tær verandi.

## Eftirlit

Hóast undantøk hava verið í ávísan mun at landa aðrastaðni enn í Føroyum, so er ógvuliga nógv landingarvirksemi um føroyskan bryggjukant. Einar 7.470 landingar frá størri og smærri fiskiførum hava verið í føroyskum havnum í 2024.

Føroyar hava, saman við Noreg, ES, Bretlandi, Íslandi og Grønlandi í november 2022, avtalað at gera "full inspection" av 5 prosentum av landingunum og 7,5 prosentum av nøgdini, sum verður landað av uppsjóvarfiski í Føroyum. "Full inspection" merkir m.a., at eftirlitsfólk skal vera til staðar alla tíðina, meðan landað verður.

Tað, at Fiskiveiðieftirlitið í 2023 fekk játtan at seta 2 eftirlitsfólk afturat, og 2 eygleiðarar í fast starv, hevur gjørt, at umstøðurnar viðvíkjandi kanningum eru betri. Hetta merkir, at Vørn er betur ført fyri at liva upp til hesa avtalu, og ikki er nógv, ið restar í, til vit eru á mørkunum, sum eru avtalað við onnur lond. Enn er kortini neyðugt í ávísan mun at nýta manningar á Brimli og Tjaldrinum at gera kanningar á landi.

At skipaeigarin ber útreiðslurnar, ið standast av at hava eygleiðarar umborð, og at 2 eygleiðarar eru í føstum starvi, bøtir um møguleikarnar at reka fiskiveiðieftirlit til havs.

Eygleiðarar frá Vørn vóru nakrar ferðir umborð á russiskum og føroyskum fiskiskipum í 2024. Eygleiðararnir staðfestu ikki nøkur brot á galdandi reglur.

Tá talan er um eftirlit til sjós, er virksemið avmarkað. Orsøkin er, at Tjaldrið einans er mannað helvtina av árinum, tí játtan ikki er til tvær manningar. Harumframt má skipið liggja nógv meira enn ætlað, grundað á m.a. tekniskar avbjóðingar og aðrar trupulleikar, ið standast av, at skipið er so gamalt.

Tjaldrið var bygt í 1976, og tað gerst støðugt truplari at útvega eykalutir til skipið. Nærum hvørja ferð onkur umvæling skal gerast, vísir tað seg, at vavið av umvælingunum gerst størri enn fyrst væntað. Umframt, at hetta ger eftirlitið til sjós minni effektivt, er tað eisini sera kostnaðar- og tíðarkrevjandi at halda Tjaldrið í tí standi, sum neyðugt er, fyri framhaldandi at lúka altjóða krøv til handilsskip.

Sama støða byrjar at gera seg galdandi við Brimli, sum nú er 25 ára gamal. Skipið er slitið eftir nógv ár í rakstri. Krøvini til viðlíkahald eru støðugt vaksandi, fyri at skipið áhaldandi kann lúka øll klassakrøv. Viðlíkahald av útsíðu skipsins krevur nú so nógv, at skipið hevur fleiri og fleiri liggidagar, tí slíkt viðlíkahald bara kann gerast í turrum og góðum veðri. Støðan versnar støðugt, so hvørt sum skipið eldist.

Føroyar hava, í avtalu við NAFO og NEAFC, bundið seg til at hava eftirlitsskip í altjóða sjógvi í ávís tíðarskeið, tá nógv virksemi er í økinum. Avbjóðingarnar við Tjaldrinum, og at Brimil, umframt at vera einasta eftirlitsskip í fullari drift, eisini er partur av tilbúgving Føroya, tá ræður um leiting og bjarging á sjónum, ger, at vit ikki megna at halda hesar ásetingar, tí Vørn hvørki metir tað vera møguligt ella forsvarligt at senda eftirlitsskipini til hesar uppgávur undir verandi fyritreytum.

Ein uppgáva, sum Brimil fer at hava frameftir, er basing av olju- og kemikaliudálking á sjónum sambært § 14 í havumhvørvislógini, sum Vørn yvirtók ábyrgdina av tann 1. januar 2025.
Hesa uppgávu fer Brimil at hava framíhjá, tí útgerðin til hesa tilbúgving sannlíkt ikki kann brúkast umborð á Tjaldrinum.

## Umsiting av fiskiloyvum

Lógin um fyrisiting av sjófeingi og sjófeingislógin hava við sær, at tað eru fleiri sløg av kvotum enn áður. Her kunnu m.a. nevnast eginkvotur, uppboðssølukvotur á 1, 3 og 8 ár, menningarkvotur, vinnuligar fiskiroyndir og ískoytiskvotur. Harafturat kunnu hesar kvotur eisini flytast ímillum ár, soleiðis at kvota, ið var keypt í 2018, hevur kunnað verið fiskað í 2019, og menningarkvota latin í 2018 kundi fiskast í 2019 o.s.fr. Talan er um nógv ymisk sløg av kvotum, sum ikki neyðturviliga eru fevndar av somu reglum viðvíkjandi avhending, veiðigjaldi, veiðiøki o.s.fr.

## Kanning av ognarviðurskiftum

Vørn hevur ábyrgd av at kanna ognarviðurskiftini hjá feløgum, ið reka, ella ætla at reka, vinnuligan fiskiskap í Føroyum. Í hesum sambandi skulu allar broytingar í ognarviðurskiftunum í feløgum, sum reka vinnuligan fiskiskap, góðkennast av Vørn, áðrenn tær verða framdar.

## Brúksskylda

1. januar 2023 kom brúksskyldan, ásett í § 36 í sjófeingislógini, í gildi.

Við gildiskomuni skal Vørn pr. 1. januar 2025, fyri fyrstu ferð, kanna eftir, hvørt nakað veiðiloyvi og/ella fiskiloyvi ikki hevur verið gagnnýtt í 2 ár á rað. Eftir 1. januar 2025 skal Vørn støðugt kanna eftir, um rættindahavarar lúka brúksskylduna.

1. januar 2025 kom eisini 60 prosent reglan, ásett í § 30, stk. 2 ávikavist § 31, stk. 2 í sjófeingislógini, í gildi. Við hesi áseting skal Vørn tryggja, at avhending av fiskidøgum og/ella kvotum ikki kann fremjast uttan so, at í minsta lagi 60 prosent av tillutaðu døgunum og/ella kvotunum eru fiskað fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari.

## 6. Støðulýsing av mest týðandi fiskastovnunum

### Fiskastovnar – ein støðulýsing grundað á frágreiðing frá Havstovuni

### Vistskipanin á føroyska landgrunninum

Vistskipanin á føroyska landgrunninum hevur seinastu umleið sjey árini verið eyðkend av lítlum gróðri og smáum nøgdum av æti, so sum nebbasild. Síðan 2022 hava tó verið ábendingar um, at umstøðurnar eru við at batna, við tað at gróðurin hevur verið um og yvir miðal, og nøgd av fiskayngli hevur verið nakað størri enn árini frammanundan. Júst hvussu nógv av hesum setir til fiskibara toskastovnin er enn nakað óvist.

### Toskur á landgrunninum

Gýtingarstovnurin av toski hevur síðan 2006 sum heild verið søguliga lítil og var í byrjanini av 2024 mettur til 15 túsund tons, sum er minni enn lágmarkið á 24.739 tons, sum er ásett í umsitingarætlanini. Hetta var eisini minni enn markvirðið, sokallaða $B_{lim}$ á 17.800 túsund tons. Tó verður gýtingarstovnurin mettur at vera oman fyri $B_{lim}$ við ársbyrjan 2026. Hetta førdi til, at Havstovan fyri 2025 mælti til ein niðurskurð í fiskidøgunum upp á 10 prosent hjá øllum bólkum. Lutfallið millum veiðu og fiskibaran stovn í 2024 var millum mørkini í umsitingarætlanini. ICES mælti til eina veiðu í 2025 á 2.848 tons.

### Toskur á Føroyabanka

Toskurin á Føroyabanka er komin fyri seg aftur. Nógv hevur verið at fáa í yvirlitstrolingunum seinastu tvey árini. Hetta er mest gamal fiskur frá árgangunum frá 2016 til 2018. Yngulkanningarnar benda á, at árgangirnir eftir 2020 kunnu gerast góðir, men hesin fiskur er ikki komin inn í fiskiskapin enn. ICES mælti til eina veiðu av toski á Føroyabanka á 575 tons í 2025. Við tað, at toskurin á Føroyabanka var rak í september 2023, mælti Havstovan til, at fiskidagarnir fyri 2024 vóru minkaðir frá 200 til 150 fiskidagar fyri at leggja uppfyri, at línan fiskar betur, tá toskurin er rak. Toskurin var framvegis rak í september 2024, og tí mælti Havstovan í desember 2024 til, at 150 fiskidagar eisini vóru galdandi fyri 2025. Hetta var til eina blanding av smáum og stórum línuførum.

### Hýsa undir Føroyum

Hýsan undir Føroyum vísir vanliga nærum somu gongd sum toskurin á landgrunninum. Tilgongdin í 2016-2018 var frægari enn vanligt. Veiðitrýstið er lækkað nakað seinastu árini og var í 2024 beint um markið, sum ICES metir gevur størstu varandi veiðu. Veiðilutfallið var niðan fyri markið í umsitingarætlanini. Gýtingarstovnurin við ársbyrjan í 2024 var mettur at vera 41 túsund tons, ið er væl meira enn 23.030 tons, sum er lágmarkið sambært umsitingarætlanini. Gýtingarstovnurin í byrjanini av 2025 var mettur til umleið 72 túsund tons. Viðmerkjast skal, at stovnsmetingarnar seinastu árini hava havt lyndi til at yvirmeta hýsustovnin. ICES mælti til eina veiðu í 2025 á 12.204 tons.

## Upsi undir Føroyum

Upsi undir Føroyum hevur ikki verið fyri sama hóttafalli sum toskur og hýsa, tó at stovnurin ikki hevur megnað at lyfta seg heilt frá fyrivarnismarkinum síðan 2010. Tilgongdin hevur verið um og niðan fyri miðal seinastu árini, og gýtingarstovnurin við ársbyrjan 2024 var mettur at vera 55 túsund tons, sum er oman fyri lágmarkið í umsitingarætlanini. Veiðitrýstið er mett at vera minni enn tað veiðitrýstið, sum gevur størstu varandi veiðu. Veiðan í 2024 í mun til fiskibaran stovn er mett at liggja millum tilvísingarvirðini í umsitingarætlanini, sum undir vanligum umstøðum hevði ført til sama fiskidagatal. Men við tað, at toskastovnurin var sera illa fyri, vóru fiskidagarnir fyri bólk 2 (trolarar) minkaðir við 10 prosentum. Tað er torført at meta um upsastovnin fram í tíðina, men ábendingar eru um, at gýtingarstovnurin og veiðan fara at økjast nakað komandi tvey árini. ICES mælti til eina veiðu í 2025 á 24.281 tons.

Ritið frá Havstovuni: "Tilmæli um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa í 2025" sæst í fylgiskjali 3.

## Longa undir Føroyum

Gýtingarstovnurin er øktur seinastu mongu árini, men eftir 2020 er gýtingarstovnurin tó nógv minkaður, soleiðis at hann í 2023 var komin niður á 10 túsund tons og í 2024 niður á sjey túsund tons. Hetta er minni enn markvirðið $B_{lim}$, sum fyri longu er 9.340 tons. Veiðitrýstið er oman fyri burðardygga veiðitrýstið, sum ICES hevur ásett. ICES hevur mælt til, at tað heldur ikki í 2025 verður fiskað nakað av longu. Longa er formliga ikki ein partur av umsitingarætlanini fyri tosk, hýsu og upsa á føroyska landgrunninum.

### Gulllaksur undir Føroyum og vestan fyri Skotland

Gýtingarstovnurin hevur verið støðugur í fleiri ár og var í 2024 mettur til 86 túsund tons. Veiðitrýstið er niðan fyri burðardygga veiðitrýstið, sum ICES hevur ásett, og ICES mælti til eina veiðu í 2025 á 18.966 tons. Veiðan eftir gulllaksi í føroyskum sjógvi er skipað við eini serstakari kvotuskipan, og hevur kvotan í fleiri ár verið 11.700 tons.

## ICES-tilmælið fyri uppsjóvarfisk 2025

ICES hevur latið tilmæli um mest loyvdu veiðu fyri makrel, svartkjaft og norðhavssild í 2025. Mest loyvda veiðan lækkar munandi fyri makrel og nakað fyri svartkjaft, meðan ein lítil hækking er í tilmælinum fyri norðhavssild.

## Makrelur

Tilmælið fyri makrel er 577 túsund tons fyri 2025, sum er ein lækking á heili 22 prosent í mun til 2024. Makrelstovnurin hevur verið í minking síðani 2014, og stovnsmetingin vísir, at niðurgongdin í stovninum helst stavar frá ovveiðu saman við eini minking í tilgongdini seinastu tíggju árini. Stovnsmetingin vísir, at gýtingarstovnurin er 2,8 mió. tons. Hetta er beint oman fyri markið (2,6 mió. tons), nær neyðugt er at vísa varsemi sambært umsitingarætlanini.

Veiðitrýstið er minkað síðan 2003 og lá árini 2010 til 2020 undir hámarkinum fyri, nær mett verður, at veiðan er burðardygg (Fmsy = 0,26). Nógva veiðan, saman við minkandi stovni, hevur havt við sær, at veiðitrýstið í 2024 var mett at vera 0,41, sum er væl oman fyri hámarksvirðið.

## Svartkjaftur

Tilmælið fyri svartkjaft er 1,4 mió. tons fyri 2025, sum er ein lækking upp á 5 prosent í mun til tilmælið í 2024. Henda lækking kemst av, at árgangirnir í 2022 og 2023 eru mettir at vera undir miðal, og tí kann ein minking væntast í gýtingarstovninum komandi árini. Bulurin í fiskiskapinum er nú góðu árgangirnir frá 2020 og 2021.

Gýtingarstovnurin er mettur at vera 6 mió. tons, sum er væl oman fyri støddina, har tað sambært umsitingarætlanini er neyðugt at vísa varsemi.

Veiðitrýstið er 0,52, sum er oman fyri burðardygga hámarkið (Fmsy = 0,32). Veiðitrýstið hevur ligið oman fyri hámarkið síðan 2014.

## Norðhavssild

Tilmælið fyri norðhavssild er 402 túsund tons fyri 2025, sum er ein hækking upp á 3 prosent samanborið við 2024. Gýtingarstovnurin hevur verið í støðugari minking frá 2008 til 2020, men góði 2016-árgangurin hevði við sær, at hann kvinkaði eitt vet uppeftir í 2020 og 2021. Gýtingarstovnurin er tó minkaður aftur í 2023 og 2024 og væntast eisini at minka í 2025.

Gýtingarstovnurin er mettur at vera 2,9 mió. tons, sum er undir markinum fyri, nær stovnurin sambært umsitingarætlanini er burðardyggur (3,184 mió. t = Btrigger). Tó kann ein glotti vera at hóma, tí tilgongdin frá 2021 og 2022 er mett at vera yvir miðal. Hesir báðir árgangirnir hava verið at sæð í Barentshavinum í 2023 og 2024 og kunnu møguliga venda gongdini komandi árini.

Veiðitrýstið hevur ligið oman fyri hámarkið síðani 2019, men er í ár minkað niður á 0,134, sum er undir hámarkinum fyri, nær varsemi skal vísast ($F_{MSY}$ = 0,157).

Talva 6.1 niðanfyri vísir ICES-tilmælini um mest loyvdu burðardygga veiðu (tons) fyri makrel, svartkjaft og norðhavssild í 2025 og broytingarnar í tilmælunum frá 2024 til 2025.

| Fiskastovnur | Tilmæli 2024 | **Tilmæli 2025** | Broyting í tilmæli frá 2024 til 2025 |
|---|---|---|---|
| Makrelur | 739.386 | **576.958** | -22% |
| Svartkjaftur | 1.529.754 | **1.447.054** | 5,4% |
| Norðhavssild | 390.010 | **401.794** | 3% |

Talva 6.1: ICES-tilmælið fyri uppsjóvarfisk 2025

## 7. Hvørjar ætlanir eru í hyggju at fremja

Í samgonguskjalinum hevur samgongan sett sær fyri, at: "Ríkidømið í havinum skal umsitast skynsamt og burðardygt. Tilfeingið er ogn Føroya fólks og skal tí umsitast soleiðis, at tað skapar virði, menning og framburð kring landið, og at virðini koma fólkinum til góða."

**Vit og komandi ættarlið gagnnýta tilfeingið**
Við fiskivinnuni sum ein av grundsúlunum undir føroyska búskapinum og føroysku vælferðini, so eigur burðardygg umsiting av okkara lívfrøðiliga tilfeingi í sjónum at vera ein heilt natúrligur partur av fiskivinnupolitikkinum.

Uttan tilfeingið í sjónum, ongin fiskivinna.

Tað er tí okkara ábyrgd at skipa fiskiskapin, soleiðis at bæði vit og komandi ættarlið fáa møguleika at gagnnýta okkara felags tilfeingi í sjónum – eitt tilfeingi, sum er og framhaldandi skal kunna vera eitt týðandi og varandi grundarlag undir vinnulívi og vælferðini her á landi.

Burðardygg gagnnýtsla av tilfeinginum í sjónum er ein týðandi liður í fiskivinnupolitikkinum hjá samgonguni – bæði tá umræður fiskiskapin undir Føroyum og í strandarlandahøpi.

Tilfeingið í sjónum er sjálvt grundarlagið undir vinnuligum virksemi í fiskivinnuni og teimum møguleikum, hetta skapar fyri reiðarí, manningar, avleiddar vinnur á landi og fyri kommunur og landskassan.

**Virðisøking – stuðul til gransking, menning og nýskapan**
Samgongan hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri, at "Vinnan skal eggjast til at nýskapa, virðisøkja og meirvirka tilfeingið". Fyri fiskivinnuna hevur hetta ført við sær eina tillaging av Fiskivinnuroyndum, soleiðis at Fiskivinnuroyndir nú eru broyttar til, at størri dentur verður lagdur á vinnuligar verkætlanir innan gransking, menning og nýskapan.

Skipanin er dagførd og fevnir nú um tvær ymiskar stuðulsskipanir:

- **Flaggskipaverkætlanir,** har tað í 2025 eru settar 3,3 mió. kr. av til vinnuligar verkætlanir innan gransking, menning og nýskapan, harundir Ph.d.-verkætlanir, sum verða framdar í samstarvi millum føroyska vinnufyritøku og føroyskan granskingarstovn.

- **Smærri verkætlanir,** har tað í 2025 er sett av 1 mió. kr. til smærri verkætlanir innan stevnuna hjá Fiskivinnuroyndum.

Ætlanin er komandi árini at menna skipanina við stuðli til vinnuligar verkætlanir innan gransking, menning og nýskapan.

Umframt at stimbra gransking, menning og nýskapan innan fiskivinnuna, so fer hetta vónandi eisini at føra við sær, at nýggj størv til útbúgvin verða skapt í fiskivinnuni, soleiðis at fiskivinnan gerst eitt spennandi øki, sum okkara ungu velja at nema sær útbúgvingar innan fyri. Hetta er eisini týðandi liður í at virka fyri, at fiskivinnan kann skapa so nógv avleitt virksemi sum til ber.

**Broytingar í Sjófeingislógini**
Í samsvari við samgonguskjalið hevur seinasta árið verið arbeitt við uppskoti um tillagingar í Sjófeingislógini. Uppskotið hevur verið til hoyringar, og eftir viðgerð av hoyringarsvarum og viðgerð í samgonguflokkunum er gjørt av at leggja uppskot fyri Løgtingið um tillagingar í Sjófeingislógini.

Uppskotið fevnir um reglurnar fyri útlendskan ognarskap, sum verða broyttar soleiðis, at nýggjur útlendskur ognarskapur ikki kann keypa seg inn í føroysk feløg við veiðirættindum, eins og verandi útlendingar ikki kunnu víðka um sín ognarlut ella avgerðarrætt í feløgum fram til 1. januar 2032, tá allur útlendskur ognarskapur skal vera úti úr veiðiliðnum.

Broyting verður eisini gjørd í miðsavningarreglunum við áseting um nærstandandi feløg, sum eftir broytingina verða roknað undir einum. Tað vil siga, at ganga t.d. somu eigarar aftur í fleiri ymiskum feløgum, sum eiga skip við veiðirættindum, so verða hesi feløg roknað sum nærstandandi.

Onnur broyting fevnir um at broyta lógina, so at nøgdirnar av uppsjóvarfiski at býta millum føroysk skip verða ásettar á sama grundarlagi, og at allir aktørarnir í uppsjóvarfiskiskapinum á tann hátt eru undir somu lógartreytum. Talan er um eina lógartekniska yvirháling av lógini, so at hon verður einfaldari at umsita og hjá borgaranum at skilja, samstundis sum broytingin ger, at loyvishavar verða viðgjørdir eins.

Nýggj skipan verður sett í verk, sum ber í sær, at tá heildarkvotan av makreli, svartkjafti og norðhavssild fer upp um eitt ásett mark, verður nøgdin, sum er omanfyri, tillutað teimum, sum frammanundan hava lutfalsliga lítlar kvotur (minni enn 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær). Endamálið er at "miðspjaða", tá kvoturnar eru stórar – og verða hesar kvoturnar bara galdandi fyri eitt ár.

At enda verður eisini gjørd ein broyting í kravinum um landing í Føroyum, so skip fáa møguleika at landa upp til 25% ella eina last av veiðuni av svartkjafti, makreli og norðhavssild uttanlands.

**Gildistíð á veiðirættindum**
Sambært sjófeingislógini er veiðiloyvið galdandi til 1. januar 2034.
Spurningurin um gildistíðina á veiðiloyvum verður viðgjørdur í samgonguni í vár, tá samgongan eisini fer at gera eina niðurstøðu um gildistíð á veiðiloyvum og fiskiloyvum.

**Nýtt vaktarskip**
Tjaldrið verður í summar 49 ár og hevur í nógv ár als ikki verið tíðarhóskandi. Aldurin á skipinum ger tað eisini støðugt truplari at útvega eykalutir til skipið. Tað er greitt, at tað er ein átrokandi tørvur á einum nýggjum skipi fyri Tjaldrið, sum kann røkja bæði vaktar- og bjargingartænastur og brúkast í tilbúgving og oljubasing.

Ein sterk tilbúgving við tveimum virknum skipum til endamálið er ein týðandi liður í at kunna røkja altjóða eftirlitsskyldur, og at kunna veita neyðstøddum hjálp á stóra havøkinum kring Føroyar.

Broytta heimspolitiska støðan og alsamt vaksandi skipaferðslan í økinum í Norðuratlantshavi merkja harumframt, at tørvur er á at menna eina munagóða oljutilbúgving, og at styrkja førleikarnar

at vera við í átøkum, sum stuðla undir verju og trygd í okkara parti av Norðuratlantshavi, t.d. sivil luttøka í NATO-flotavenjingum.

Arbeitt verður áhaldandi við ætlanini um at fáa eitt skip ístaðin fyri Tjaldrið. Neyðugt er, at hetta arbeiðið nú av álvara kemur ígongd, og er tað eisini málsetningurin hjá landsstýrinum.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, 19. februar 2025

**Dennis Holm (sign.)**
*landsstýrismaður*